# Hetland ikki næsti granni

Tá ið vit tosa um føroyingar og umheimin, hoyra vit javnan og savnan, at Hetland er okkara næsti granni, tí tað er vanliga fatanin. Men veruleikin er, at okkara næsti granni er ein av Suðuroyggjum, ella Hebridunum. Ein av Suðuroyggjum eitur Rona, ella North Rona í vanligari talu og hon er so norðaliga, at hon er næsta land úr Føroyum. North Rona er 120 ha stór, ella nakað størri enn Lítla Dímun, sum er 84 ha. Rona er 116 metrar høg. Hendan oyggin er 256 km úr Akrabergi. Hinvegin eru 284 km úr Akrabergi til Foula í Hetlandi. Fólk búði á Rona til síðst í 17. øld, tá ið øll 30 fólkini, ið eftir vóru, doyði av sjúku, har smittuberararnir vóru rottur, sum eitt skip, ið fór á land á oynni, førdi við sær. Kelda: www.matrikul.fo og Wikipedia



# Fyrsti hemarin fingin

Fyrsti hemarin í Shark Atlantic-kappingini er nú drigin upp av grunni. Hann varð fingin suður úr Kirkjubønesi leygardagin og vigaði 115 kilo. Tað var Heini Weihe, sum fekk hemaran og hann brúkti bara 20 minuttir um at møða hann. Men fongurin hevur so fyribils tryggjað honum eitt 10-túrakort við Atlantsflogi.



*Royndir maskinstjórar siga, at verandi skipanir eru ringar at fáast við. Hesar reinsa lutfalsliga smáar nøgdir av kjalavatni í mun til tørvin umborð, og lensivatnið er ikki nóg reint. Aftrat hesum er nógv vatn í fráskildu oljuni, og tí er kostnaðarmikið at fáa nakað burtur úr spilloljuni, tá hon er fingin upp á land til víðari nýtslu*

mær í Vági. Skipanin er ikki roynd umborð á nøkrum skipi enn, men við teimum royndum, eg havi sum maskinstjóri, ivist eg onga løtu í, at hon riggar eins væl umborð sum í landi.

Nýggja skipanin er roynd í einar tveir mánaðir.

Kaj sigur, at meðan aðrar tílíkar skipanir vanliga bara eru í gongd umborð á skipum, meðan lensað verður, koyrir skipanin hjá honum alla tíðina – og soleiðis skilir hon olju úr kjalavatninum alla tíðina.

## Tøknin aftanfyri

- Skipanin byggir í høvuðsheitum á eitt flutningsband, sum gongur niður í kjølin og "sleipar" oljuna av yvirflatuni á kjalavatninum við sær upp í slammtanga. Bandið gongur heilt niður í kjølin, og sjálv reinsiskipanin er í erva.

Uppfinnarin sigur, at honum kunnugt er henda skipanin, sum hann hevur sett saman, ongastaðni roynd áður.

– Eg havi ikki fingið patent upp á skipanina enn, men havi søkt um tað, leggur hann aftrat.

Kaj sigur, at eitt er, at skipanin tekur oljuna burtur úr kjalavatninum. Annað er, at hon tekur einki vatn við sær. Tað er so at siga bara olja, sum kemur í slamtangan.

– Við tað, at skipanin koyrir alla tíðina, heldur hon eisini kjalavatnið reint, soleiðis at ringur og óbehagiligur roykur ikki ferðast um maskinrúmið og skipið annars. Annað, sum eisini er tryggjandi við hesi skipan, er, at hon minkar um vandan fyri eldi av olju og eiturevnum, sum kunnu enda í kjølinum.

## Fingið stuðul

Tað var í januar 2007, at Kaj Joensen vendi sær til Jacob Vestergaard, landsstýrismann í umhvørvismálum við fyrispurningi um, hvørt tað var gjørligt at fáa fíggjarligan stuðul til eina skipan, sum hann hevði ætlanir um at menna innan skiljing av olju úr lensivatni hjá skipum.

Uppfinnarin metti, at eingin fullgóð teknisk loysn er fingin á hesum trupulleika, sum tískil er eitt framhaldandi vandamál og umhvørvismál.

Landsstýrismaðurin bjóðaði Kaj at koma í Innlendismálaráðið at leggja fram sína ætlan, og stutt eftir avgjørdi landsstýrismaðurin at veita uppfinnaranum 150.000 krónur av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

Peningurin skuldi nýtast til at menna eina sonevnda prototypu av skipanini. Seinni avgjørdi landsstýrismaðurin at hækka játtanina í sambandi við fyrireiking av umsókn um patent.

Sjálvur fegnast Jacob Vestergaard um, at landsstýrið soleiðis hevur verið við til at stuðlað eini verkætlan, sum ikki bert kann geva føroyska samfelagnum eitt vinnuligt íkast, men sum eisini kann vera við at "branda" okkara vinnu og land í altjóða høpi.

Eitt av verandi vandamálum á hesum øki er, at tølini í loggbókini yvir oljudálkað kjalavatn ikki vera hildin at vera røtt, og tí verður eisini hildið, at trupulleikin við spillolju á havinum er nógv størri, enn tølini siga.

Orsøkin til støðuna er heilt einfalt hon, at tey tól og tær skipanir, sum higartil hava verið tøkar, als ikki eru nøktandi.

Royndir maskinstjórar siga, at verandi skipanir eru ringar at fáast við, sjálvt hjá vælútbúnum maskinmonnum. Hesar reinsa lutfalsliga smáar nøgdir av kjalavatni í mun til tørvin umborð og lensivatnið, sum kemur úr skipinum, er ikki nóg reint. Aftrat hesum er nógv vatn í fráskildu oljuni, og tí er kostnaðarmikið at fáa nakað burtur úr spilloljuni, tá hon er fingin upp á land til víðari nýtslu.

## Nógvir fyrimunir

Í sambandi við ST-átakið "United Nations Environment Programme" er komið fram, at lensivatnið frá skipum helst er størsta einstaka kelda til dálking av heimshøvunum, tí hetta er nakað, sum hendir hvønn einasta dag – og allastaðni kring knøttin.

Stórir oljulekar henda sjáldan, og sum oftast verða myndugleikarnir varugir við dálkingina heilt skjótt. Tí ber vanliga til at byrgja oljuna inni og taka hana uppaftur.

Avleiðingarnar av oljudálking á havinum kunnu vera ógvusligar. Talan kann bæði vera um umhvørvisligar og búskaparligar avleiðingar. Nógvar livandi verur ganga til grundar ella gerast sjúkar. Nógvur fuglur, fiskur og havsúgdýr doyggja av oljudálking á hvørjum ári, og tilhaldsstøð teirra verða oyðiløgd.

Oljuskiljiskipanin hjá Kaj Joensen verður ikki serliga kostnaðarmikil, og hon kann lagast til bæði stór og smá skip.

Av eginleikunum, sum henda skipan hevur, kunnu nevnast, at skiljingin fer fram alla tíðina, at skipanin kann lagast til støðd á skipi og innrætting av maskinrúmi, lensivatnið, sum kemur úr skipanini, er sera reint, og lítið av vatni er í oljuni, sum verður skild frá.

Aftrat hesum kemur, at hon er einføld, løtt at arbeiða við og løtt at viðlíkahalda.

Nýggja skipanin fer eisini at gagna fólkaheilsuni og trivnaðinum, bæði umborð og hjá fólki á landi.

Mett verður, at nýggja uppfinningin fer at styrkja ímyndina av reinleika í føroysku náttúruni.

Tøknin hjá Kaj Joensen kann gerast ein sonn kollvelting innan umhvørvisvernd, heilsu og trygd á sjónum.